Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 10**



- Tað er ótrúlig, sum tú dugir væl – tú ert so klókur, sigur Anthonio, sum eisini flennir alt hann orkar. Hi hi hi hi.

Teir leggja so eina gávu fyri og aðra eftir, og tað gera teir, til teir eru komnir heilt niðan til húsini hjá trøllinum.

- Skulu vit ikki fara inn til Trølla Ommuna og stjala gávurnar hjá Trølla Pætur? spyr Anthonio.

- Ert tú skítbýttur. Um løgreglan skal trúgva, at tað er Trølla Omman sum hevur stolið allar gávurnar í bygdini, so kunnu vit ikki stjala gávurnar frá teimum.

- Eg skilji teg Stampi, tú ert genialur.

Tá teir koma inn í skúrin aftur, hyggja teir beinanvegin, um jólamaður er vaknaður - tað er hann tíbetur ikki. Men nú eru so nógvar gávur inni í skúrinum, at tað illa ber til at vera inni. Ja tað eru so nógvar gávur, at teir ikki síggja hvønn annan.

- Anthonio, nú eiga vit flestu leika í verðini.

- Jú, men hvussu fáa øll leikaði av landinum, vit kunnu ikki vera her við teimum? spyr Anthonio, meðan hann turkar sveittan av panni.

- Tað er eingin trupulleiki. Næstu nátt, meðan øll sova, bera vit allar gávurnar oman í ein bát, sum vit so sigla avstað við, svarar Stampi smílandi.

- Jú, men vit eiga ongan bát!

- Vit stjala ein, rópar Stampi.

Lagið er gott á teimum, men teir eru troyttir. Teir hava jú verið uppi alla náttina, og nú vilja teir bara sova.

- Nú mugu vit leggja okkum at sova Anthonio. Vit mugu verða væl fyri komandi nátt, letur í Stampa, meðan hann rembir sær.

- Ja, eg leggi meg beint her, so kann eg balla meg millum allar gávurnar, ha hi hi, flennir Anthonio. Meðan fólkini í Hvannadali so við og við vakna, so sovnar Leikamafian.

Uttan fyri flykrar so mikið nógv, at skjótt hvørva øll sporini, sum Leikamafian hevur sett eftir sær í bygdini. Tað leggjast eisini flykrur á gávurnar, sum liggja frá bygdini av niðan til húsini hjá trøllunum. Men onkrar av gávunum eru so mikið stórar, at tað skal nógvur kavi til at dekka tær til.

Jógvan er longu møttir á politistøðini, tá Erling kemur til arbeiðis. Góðan morgun Jógvan. Góðan morgun Erling. Beint tá ringir telefonin. Jógvan tekur telefonina.

- Hvat sigur tú? Eru gávurnar stolnar? Hvat ólukkan er tað fyri nakað? Jú, vit koma beinanvegin.

-Hvørvarhatta? spyr Erling, meðan hann hyggur undrandi upp á Jógvan.

- Hatta vóru tey hjá Hanusi - onkur hevur verið inni í húsinum í nátt og stolið allar jólagávurnar.

Men áðrenn Erling fær sagt eitt orð, ringir telefonin enn einaferð.

- Tað er Jógvan yvirpolitimeistari, hvat kann eg hjálpa tær við? Hvat sigur tú? Eru eisini tykkara gávur stolnar? Vit koma beinanvegin!

*Puntur 14 til jólakalendaran*



